## Friða part av Svalbard

Norska ferðavinnan er sera misnøgd við, at myndugleikarnir hava gjørt av at friða umleið 40 prosent av Svalbard fyri teimum stóru ferðamannaskipunum, sum á hvørjum sumri sigla runt við ferðafólki. Myndugleikarnir siga, at tað er neyðugt at avmarka møguleikarnar hjá ferðafólki at fara í land fyri at verja umhvørvið. Fyri 10 árum síðani fóru umleið 800 ferðafólk í land har eysturi á Svalbard. Í fjør var talið næstan 13.000, skrivar ANB.



*Náttúran á Svalbard tolir ikki ov mong ferðafólk*

*Savnamynd*

# Føroyskt-giftur lektari myrdur

**40 ára gamli lektarin við Örebro Universitet, føroysktgifti Fuat Deniz, doyði í gjáramorgun av knívsárum, hann fekk undir einum álopi týsdagin á universitetinum**

DRÁP

*Leo Poulsen*

*leo@sosialurin.fo*



*Løgreglan byrgdi økið av, har drápið fór fram. Innsetta myndin er av Fuat Deniz*

*Mynd: www.aftonbladet.se*

Tað var um klokkan 15.30 lokala tíð týsdagin, at ein enn ókendur maður leyp á lektaran á universitetinum og stakk hann fleiri ferðir við knívi. Sum skilst vóru eingi vitnir til hendingina, og tað er ein av orsøkunum til, at løgreglan enn ikki hevur handtikið nakran í sambandi við álopið.

Fuat Deniz var koyrdur á universitetssjúkrahúsið í Örebro, men hóast læknarnir stríddust fyri at bjarga honum, eydnaðist tað ikki, og tíðliga gjáramorgunin doyði hann so av løstunum.

Hann doyði av sjálvum skaðunum. Hann var uppaftur lívaður á ástaðnum, men tíverri megnaðu vit ikki at bjarga lívi hansara, segði Lars Berggren, yvirlækni, við Aftonbladet.

Politiið jagstrar framvegis gerningsmannin og teir siga seg hava spor at ganga eftir, men vilja kortini ikki avdúka hvørji. Teir hava eisini biðið statsløgregluna, Säpo, um at hjálpa til í málinum. Säpo er statsløgreglan og svarar til danska PET. Teir koma inn í myndina, tí Deniz er av turkiskum uppruna.

Umframt landsdekkandi Aftonbladet eru sjálvandi lokalu dagbløðini á tremur við greinum um hendingina. Alla staðni verður sagt frá, at lektarin var sera væl umtóktur, og eingin dugir at skilja, at ein slík lagna skuldi raka hann.

### Føroyskt giftur

Undir øllum umstøðum er ákæran nú broytt frá drápsroynd til dráp, sigur løgregluovastin í Örebro, Torbjörn Carlson, við svenska blaðið Aftonposten.

Allan gjár og allan dag hevur løgreglan arbeitt miðvíst við at loysa drápsmálið, men higartil uttan úrslit. Samstundis er løgreglan ógvuliga afturhaldin við at upplýsa, hvørji spor teir ganga eftir. Eitt nú vilja teir ikki siga, um teir hava funnið knívin, sum varð nýttur í drápinum.

Nógvir upplýsningar eru komnir frá almenninginum, men løgreglan sigur, at vitnir eru ógvuliga ójøvn á máli um eitt nú útsjónd og rýmingarveg.

Faut Deniz, ið er av turkiskum uppruna, var giftur føroyskari kvinnu. Hon hevur búð í Svøríki í nógv ár og var fyrr gift svenskum manni. Saman við Fuat Deniz átti hon eina trý ára gamla dóttir.

# Javnstøðan haltar

KVINNUUMBOÐAN

*Tíðindaskriv*

Sambært javnstøðulógini, § 8, skulu allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Tá ið orsøkir eru fyri tí, kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær.

Javnstøðunevndin fær millum fáar og ongar umsóknir um undantaksloyvi. Nevndin setti sær í oktober 2006 tí fyri at kanna, hvussu kynsbýtið í almennu nevndunum, ráðunum og líknandi sær út. Toppskorari er Almanna- og heilsuráðið, har nevndarlimabýtið millum menn og kvinnur er 53-47 prosent, og 10 av teimum 11 nevndunum hava javnstøðu.

Botnskavari er Fiskimálaráðið, har býtið er 92 prosent menn og 8 prosent kvinnur, og bara 1 av teimum 9 nevndunum hevur javnstøðu.

Javnstøðunevndin gjørdi eina líknandi kanning í 2000, og støðan hesi sjey árini er ikki nógv batnað. Í 2000 vóru 70 prosent av nevndarlimunum í teimum táverandi seks aðalráðunum menn; í 2007 er hetta tal fallið til 65 prosent.

Í flestu ráðunum er lítil og eingin munur á prosentbýtinum í 2000 og 2007; tó eru tvey undantøk: Fíggjarmálaráðið og Mentamálaráðið. Í Fíggjarmálaráðnum og Mentamálaráðnum vóru ávikavist 75 prosent og 63 prosent av nevndarlimunum í 2000 menn, men síðan eru tølini fallin til ávikavist 57 prosent og 54 prosent.

Í Fíggjarmálaráðnum er javnstøða í 8 av teimum 9 nevndunum. Sostatt hevur Fíggjarmálaráðið havt nógv ta størstu framgongdina í javnstøðu seinastu sjey árini.63 av teimum tilsamans 102 nevndum hava javnstøðu, t.e. 62 prosent. Javnstøðunevndin fer í framtíðini at fylgja við, tá ið aðalráðini seta nevndir, ráð og líknandi, og í góðari tíð minna tey á at halda § 8 í javnstøðulógini.

# Ríkisumboðsmaður veit nógv um Føroyar

**Tá vaktarskifti verður í Amtmantsbrekkuni, er tað ikki eitt óskrivað blað í føroyskum viðurskiftum, ið tekur sæti sum nýggjur ríkisumboðsmaður**

RÍKISUMBOÐ

*Kári Mikkelsen*

*karim@sosialurin.fo*



*45 ára gamli Dan M. Knudsen, ið tekur við sum ríkisumboðsmaður 1. januar, hevur búð og arbeitt í Føroyum í 10 ár, og hevur sostatt gott innlit í føroysk viðurskifti*

Dan M. Knudsen, sum avloysir Søren Christensen sum ríkisumboðsmaðuri við ársskiftið, hevur búð í Føroyum og arbeitt við føroyskum viðurskiftum, síðani hann tók samfelagsliga kandidatútbúgving á Odense Universitet (nú Syddansk Universitet) í 1997. Tey fyrstu trý árini arbeiddi hann í Fíggjarmálaráðnum, og síðani 2000 hevur hann verið fulltrúi og serkonsulentur á Ríkisumboðnum.

Í stuttari viðtalu við Sosialin, sigur Dan M. Knudsen, at hann sum ríkisumboð hevur rættiliga fastlagdar uppgávur, ið snúgva seg um familjurættarlig viðurskifti, sum til dømis sundurlesing av hjúnum, foreldrasamveru við børn og ættleiðing. Harafturat skal hann sum danskur embætismaður ikki føra politikk, men fylgja løgtingsarbeiðinum og gera frágreiðingar til danskar myndugleikar og hjálpa føroyskum myndugleikum við sambandinum til Danmarkar og øvugt.

– Eg haldi meg havi gott innlit í føroyska samfelagið, og hetta fer ivaleyst at koma væl við í starvinum, sigur Dan M. Knudsen, ið er giftur við Margrethu, sum er ættað av Viðareiði. Tey eiga ein drong upp á 14 ár og eina gentu upp á níggju, sum ganga í skúla í Kommunuskúlanum í Havn.